**Røða løgmans til tiltakið ”Ársins íverkseti 2016**

Góðan dagin øll somul.

Søgan um ársins íverksetarar fyri 2016 er søgan um tveir ungar havnarmenn, sum eru føddir seint í fýrsunum og uppvaksnir í Eysturbýnum í Havn.

Stutt eftir aldaskiftið kveiktist teirra vinalag og teirra stóri áhugi fyri myndatólinum. Annar teirra hevði tá útvegað sær eitt av teimum góðu gomlu "gráu" heimakameraunum, og ofta filmaði hann hin, tá ið hann kom úr skúlanum.

Hetta varð startskotið. Árini eftir aldaskiftið royna teir seg veruliga. Bæði við hundraðtals tekniskum royndum og við stuttfilmum.

Virksemið hjá ungu havnarmonnunum vaks. Neyðugt var tí at finna eitt hóskandi heiti fyri teirra filmsvirksemi. Báðir siga seg dáma væl tað reina og tað kalda. Og teir hava altíð kent seg aftur í tí arktiska økinum.Tað sæst eisini aftur í tí, teir gera. Teir leggja seg altíð eftir at fáa tað reint, virðiligt og lýtaleyst.

Tá ið teir báðir skuldu taka støðu til, hvørja lívsleið, teir ynsktu sær, var eingin ivi. Teir vildu fylgja sínum hjarta. Sínum høvuðsáhugamáli. Og teir vildu skapa sítt egna arbeiðspláss. Hetta krevur dirvi og dugnasemi.

Ársins íverksetarar hava ikki sitið hendur í favn og bíðað eftir pengum aðrastaðni frá. Teir hava stríðst fyri at tryggja sær neyðugu inntøkurnar.

Skuldi teirra dreymur um egi virki gerast veruleiki, var neyðugt at stríðast fyri tí sjálvur.

Og fyritreytirnar fyri at røkka dreyminum eru góðar. Arbeiðsstevið teirra millum er frálíkt, og felagsandin er kjarnin í øllum, teir gera.

Hjá teimum hevur tað ikki snúð seg um tann einstaka, men heldur hvat teir kunnu avrika saman.

Vit fegnast um, at tit høvdu neyðuga áræði til at fylgja hjartanum og skaptu tykkara egna starv. Úrslitið síggja vit í dag. Tykkara frálíku lýsingarfilmar eru at síggja í øllum miðlum í Føroyum.

Men tit hava ongar ætlanir um at seta tykkum aftur á fyri at njóta framd avrik. Nógvar spennandi uppgávur liggja fyri framman, og virksemi tykkara veksur støðugt.

Tit eru fyrimyndir fyri aðrar íverksetarar. Tit hava frá botni bygt tykkara fyritøku. Og tit hava loyst størstu avbjóðingina av øllum, nevniliga at fáa tykkara virksemi at bera seg. Tað havi eg stóra virðing fyri.

Vit vita av royndum, at tað trýtur ikki við hugskotum og nýhugsan. Tann avgerandi avbjóðingin hjá íverksetum eru evnini at røkka allan vegin út á marknaðin og at yvirliva við svørtum tølum á botnlinjuni.

Og tað hava teir báðir havnarmenninir Andres Jacobsen og Brian Samson megnað.

Tað er tí mær ein heiður at handa Polar Films Entertainment “Granan” sum ársins íverkseti 2016!

Takk fyri!

Aksel V. Johannesen

Løgmaður